KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

# *Vegleiðing í sambandi við andlát og jarðarferð*

Við deyða og jarðarferð er so mangt, ið avvarðandi hava at hugsa um. Hetta er ætlað sum ein leiðbeining til tað, ið er mest neyðugt at fyrireika.

Í sambandi við andlát skulu avvarðandi seta seg í samband við Sjúklingaskrivstovuna, tel. 454545, lokal 4507.

Í vikuskiftinum skal ringjast til tel. 454545

**Kista og líkverja**
Vanliga bíleggur sjúkrahúsið kistu og líkverju. Sjúklingaskrivstovan skal hava upplýsingar um navn og bústað hjá avvarðandi, ið skal standa fyri og gjalda kistuna og líkverjuna. (Ávíst endurgjald fæst frá Heilsutrygd). Vanliga verður lokið lagt á kistuna ein tíma áðrenn farið verður úr kapellinum.

**Bønarhald**
Vanligt er, at bønarhald er í kapellinum á sjúkrahúsinum (hetta avgera avvarðandi sjálvi). Í hesum sambandi avgera avvarðandi nær bønarhaldið skal vera, og skulu tosa við prest ella talara, sum skal tala á bønarhaldinum. Saman avgera tit, nær bønarhaldið skal vera, og boðað Sjúklingaskrivstovuni frá hesum, og hvør sálma- ella songbók skal nýtast.

**Lýsingar**
Kringvarp Føroya hevur tel. 347500 ella teldupost andlát@kvf.fo

**Gravarar**
Avtala skal gerast við gravara á tel. 221610. Gravarar skulu hava boð, áðrenn jarðarferðin verður kunngjørd.

**Líkbilur**
Avvarðandi bíleggja sjálvi líkbil. Líkbilur í Klaksvík tel. 221610.

**Í kapellinum**
Avtala skal gerast við 6 berarar av kistuni, við urguleikara og møguliga sangarar.

**Kirkja/samkomuhús**
Avtala skal gerast við prest/talara, sum síðani vegleiðir tykkum.

**Sangir til jarðarferðina**
Avtala skal gerast við prentsmiðju skjótast tilber.

**Børuprýði**
Ynskja tit børuprýði, skulu tit sjálvi bíleggja tað. Summardáin tel. 456193 ella Blómuhandilin Flora tel. 455115. Minnist til at gera avtalu um koyring av blómum og kransum út á grøvina.

**Fráboðan**
Sjúklingaskrivstovan boðar myndugleikunum, presti og skiftirættinum frá andlátinum.

**Eftirmeting**
Umleið 1 mánaða aftaná jarðarferðina ringir sjúkrarøktarfrøðingur til avvarðandi at eftirmeta sjúkugongdina.

*Við samkenslu*

estra/VASTI